# Tíðaravmarkað starv sum programmfólk

Fyri starvsfólk, ið fer í barnsburðarfarloyvi, søkir Kringvarp Føroya eftir einum programmfólki til Mentanardeildina.

Høvuðsuppgávan hjá tí setta verður at gera morgunsendingina, Góðan Morgun Føroyar, umframt aðrar uppgávur og sendingar á Mentan.

Mentanardeildin ger sendingar og tilfar til útvarp, sjónvarp og internet.

**VIT BJÓÐA**

- eitt áhugavert og avbjóðandi starv í kreativum umhvørvi
- eitt sjálvstøðugt starv, har tú kanst seta tín dám á

**VIT VÆNTA, AT TÚ**

- hevur miðlaútbúgving ella aðra viðkomandi útbúgving
- hevur starvsroyndir á miðlaøkinum ella aðrar viðkomandi royndir
- dugir væl føroyskt, bæði í skrift og talu

**VIT YNSKJA, AT TÚ**

- hevur góð hugskot og ert kreativ/ur
- hevur áhuga fyri samfelag og mentan
- hevur góð samstarvsevni og ert jalig/ur
- hevur áræði og arbeiðir sjálvstøðugt
- megnar at halda freistir og ert væl skipað/ur

**SETANARVIÐURSKIFTI**

Talan er um barsilsstarv í eitt ár, frá 1. september 2019 til 31. august 2020. Starvið er fulla tíð og verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Setanarøkið fevnir um Kringvarp Føroya. Tann, ið settur verður, má tola broytingar í starvstíðini.

**UMSÓKN OG FREIST**

Send umsókn við avritum av prógvum, lívsgongdarlýsing og viðkomandi skjølum/ tilvísingum í teldubrævi til: umsokn@kvf.fo. Freistin er mánadagin 1. juli 2019.

**FLEIRI UPPLÝSINGAR**

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Kára Sólstein, leiðara á Mentan, tlf. 296634 ella á teldupost karisol@kvf.fo

KRINGVARP FØROYA

Kringvarp Føroya er sjálvstøðugur almennur stovnur, sum virkar óheftur av politisku skipanini. Kringvarpsstjórin stjórnar stovninum við tilvísing til stýrið, ið telur sjey limir. Virksemið verður fíggjað við kringvarpsgjaldi og inntøkum frá kunngerðum, ískoytisveitingum og eydnuspølum. Kringvarp Føroya hevur fýra deildir: Aktuelt, Mentan, Tøkni og Fyrisiting. Umleið 80 fólk eru í føstum starvi á stovninum.